Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Nr. 49/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um avgerð um farloyvi hjá kommunustýrislimum, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Var tað ein politisk avgerð, nú siðvenjan viðvíkjandi farloyvi hjá kommunustýrislimi brádliga varð broytt beint fyri jól?
2. Kann landsstýrismaðurin greiða frá løgfrøðiligu grundgevingunum fyri hesi kúvending?
3. Metir landsstýrismaðurin, at starvið sum kommunustýrislimur bara er ein framíhjárættur, sum hvør einstakur kommunustýrislimur kann velja at røkja ella ikki at røkja?
4. Um so er, metir landsstýrismaðurin hetta vera fremjandi fyri kommunustýrisarbeiðið og álitið á kommunustýrisarbeiðið?

Viðmerkingar:
Á fundi í Tórshavnar býráð, tann 18. desember 2019, fekk borgarstjórin eina niðurstøðu frá Umhvørvis- og vinumálaráðnum, sum sigur, at ein býráðslimur, sum er í farloyvi, altíð kann taka sæti aftur í býráðnum.
Øll míni 47 ár í býráðspolitikki hevur tað verið rimmarføst siðvenja, at fer býráðslimur í farloyvi, skal farloyvið vera fyri í minsta lagi samfullar 14 dagar. Tað vil siga, at er tú fyrst farin í farloyvi, ber í fyrsta lagi til at taka sæti aftur í býráðnum, tá teir fyrstu 14 dagarnir eru umlidnir. Sama skipan er galdandi fyri tingfólk, har farloyvistíðin er ásett at vera í minsta lagi 7 dagar, og til ber ikki at taka sætið aftur, fyrr enn teir fyrstu 7 dagarnir eru farnir.
Á skeiðum og frá løgfrøðiligum ráðgevum hava vit fingið at vita, at reglurnar eru, sum tær eru, tí at býráðsarbeiðið er ein borgaraskylda. Ein kommunustýrislimur skal ikki kunna skáka sær undan at taka avgerð í truplum málum við at fara í farloyvi, fyri síðani at taka sætið aftur dagin eftir. Tí eru eisini strong formlig krøv sett í lógina fyri at kunna fara í farloyvi.
Tað stendur ikki staðiliga í grein 18 í lógini, at býráðslimi er bannað at møta aftur, fyrr enn teir 14 dagarnir eru umlidnir, og borgarstjórin í Tórshavnar kommunu hevur víst á, at tað stendur í grein 19 í lógini, at tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri at luttaka, fer innkomni tiltakslimurin út. Tað er rætt, at hetta stendur í lógini, men grein 19 snýr seg einans um mannagongdina við útskifting, tá ið fleiri tiltakslimir eru inni í senn, og ikki um longdina av farloyvinum ella nær kommunustýrislimurin í fyrsta lagi kann taka sæti aftur.
Hetta ber ikki til at misskilja, og siðvenjan hevur verið rimmarføst, bæði undir hesi lógini og teirri gomlu kommunulógini. Tí er hendan kúvendingin eitt álvarsmál, ið eigur at verða viðgjørd og greinað út í æsir. Hetta er eitt óvanliga prinsipielt mál, sum í fyrsta lagi snýr seg um, undir hvørjum umstøðum umsitingin kann velja at kúvenda frá eini fastari, gamlari og rótfestari lógartulking og siðvenju á einum øki. Í øðrum lagi snýr tað seg, hvussu starvið sum kommunustýrislimur skal metast, tí tað er ein grundsteinur undir skipanini, at kommunustýrislimir hava møtiskyldu og skulu hava góðar orsakir til ikki at taka lut í viðgerðum á formliga lýstum fundum. Stórur dentur hevur verið lagdur á, at kommunustýrislimir skulu ikki kunna skáka sær undan viðgerðum, sum av onkrari orsøk ikki hóvar teimum, og tí hava reglurnar kring farloyvi verið strangar og fastar.
Verður niðurstøðan hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum galdandi frameftir, so fer júst at bera til at skáka sær undan við at fara í farloyvi (í minst samfullar 14 dagar), men dagin eftir at broyta hugsan og taka sætið aftur – ein kann uttan himpr fara og koma sum einum lystir.

Á Løgtingi, 24. januar 2020

Heðin Mortensen